## DAGSINS MEINING

# Ringið til ein danskan serfrøðing!

Útvarp Føroya endurgav herfyri úr einari grein í Dimmalætting, har Poul Michelsen finst at ætlanunum um einans at selja triðingin í Atlantsflog í fyrsta umfari. Hetta metti man verða tíðindi, sum eru verd at endurgeva. Tað er sjálvandi áhugavert, at ein samgongutingmaður er ósamdur við einari samgonguætlan, men er tað nú tað mest áhugaverda í hesum máli? Hvussu við habilitetinum?

Í desembur mánaði í fjør var Framtaksfelagið Notio endurgivið í Útvarpi Føroya fyri at hava áhuga í Atlantsflog. Hetta man helst verða einasta felag, sum alment hevur boðað frá áhuga í Atlantsflog, og tí er tað rættiliga relevant at hyggja eftir, hvør stendur aftanfyri hetta felag. Her hitta vit aftur Poul Michelsen. P/F Poul Michelsen var ein av stovnarunum av Framtaksfelagnum Notio. Notio eigur eisini 30% av partapeninginum í P/F Poul Michelsen.

Hetta merkir, at tinglimurin Poul Michelsen ikki bara er tinglimur, men eisini er ein av stovnarnum av felagnum, sum alment hevur boðað frá áhuga í at keypa Atlantsflog. Sama Notio felag, sum er stóraktionerur í P/F Poul Michelsen í dag. Hetta setir hansara viðmerkingar í eitt heilt annað ljós, og kann tað undra, at eingin hevur mett hesar upplýsingar verða áhugaverdar fyri borgaran, tá man nú avger at endurgeva Poul Michelsen. Tað kundi verið áhugavert at fingið eina afturmelding frá miðlunum, sum endurgeva Poul Michelsen, um hví tað ikki var mett at hava áhuga millum fólk, at sami Poul Michelsen er tætt knýttur at Notio.

Man kundi spurt, hví ikki varð ringt til ein danskan serfrøðing og spurt, um tað hevði komið fyri, at ein danskur fólkatingslimur, ið var ein av stovnarnum av einari fyritøku, sum alment hevur boðað frá áhuga í einari statsogn, hevði úttalað seg um søluna av somu statsogn. At talan er um ein habilitetstrupulleika er helst lítil ivi um, óansæð um einum tørvar at ringja til onkran hissini serfrøðing ella ikki.

Poul Michelsen kann salvandi sum tinglimur úttala seg um hvat sum helst, men tað eigur at verða sjálvsagt, at slík úttalilsi verða sett í samanhang og vigað hareftir. Tá nú eitt felag, sum P/F Poul Michelsen er ein av stovnarunum av, og sum harafturat hevur keypt 30% í P/F Poul Michelsen, alment hevur víst áhuga í at keypa Atlantsflog, so setur tað úttalilsini hjá Poul Michelsen um søluna av Atlantsflogi í perspektiv.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Býarætlan snarar Havnini vesturá

**JÓGVAN ARGE**
Varaborgarstjóri
í Havn



Tíðliga í fjør summar samtykti býráðið at fara undir at endurskoða býarætlanina fyri gomlu Tórshavnar kommunu. Hetta arbeiðið er nú lokið, og býráðið hevur samtykt endurskoðaðu heildarætlanina fyri tíðarskeiðið 2005-2022.

Roknað verður við eitt sindur minni fólkavøkstri enn í teirri ætlæanini, sum farið varð undir í 2001. Tá varð roknað við einum miðal fólkavøkstri í Tórshavnar kommunu uppá 1,75 prosent árliga fram til 2022.

Hetta tal er nú stillað niður til 1,25 prosent í árligum fólkavøkstri. Broytingin byggir á gongdina í fólkatalinum seinastu árini. Stillingin merkir m.a., at krøvini til kommununa um byggilendi og stovnar av ymsum slag verða heldur minni, enn mett varð fyri fáum árum síðani.

Høvuðssetningurin í arbeiðnum at endurskoða heildarætlanina var, at fáa landafrøðiliga javnvág í býarmenningina og raðfesta Vesturbýin og økið hjá gomlu Argja kommunu fremri í tíðarætlanini, enn gjørt varð í fyrru heildarætlanini.

Hetta er gjørt á tann hátt, at býarmenningin í Hoyvíkshaganum verður tambað í tíð samstundis, sum útbygging av Vesturbýnum og Argjum verður tikin longur fram.

Ætlaðar byggingar og útstykkingar vestanfyri verða skundaðar fram í tíðarætlanini 2005 til 2022. Umvent merkir hetta, at tað verður ikki lagt so stórt trýst á Hoyvíkshagan so tíðliga í skeiðnum, sum ætlanin annars var.

**Frá Hamrinum til Stórutjørn**
Tað vestasta, hendan ætlanin fevnir um, er víðkan av bygginigini á Hamrinum á Argjum, og tað norðasta økið, sum ætlanin er at byggja, er við Stórutjørn í Hoyvíkshaganum.

Harímillum eru ymisk øki, sum verða løgd út serliga til bústaðarbygging og stovnsbyggingar, sum hoyra einum framkomnum býi til.

Sum dømi um aðra nýggja útstykking kann nevnast, at ætlanin er at binda saman millum Miðhorn og Norðasta Horn, og ætlanin er eisini sum frálíður at fara undir bústaðarbygging Undir Vesturvarða í Flatnahaga.

Samstundis, sum ætlanir verða lagdar um bústaðarøki, verða eisini lagdar ætlanir um øki, har vinnulívið kann húsast. Hesi bæði mugu ganga hond í hond, tí annars er ongin samanhangur í framtíðarætlanunum.

Í stóran mun er ætlanin at leggja tey tungu arbeiðsplássini í nánd av Sandvíkahjalla og Skarðshjalla, meðan onnur lættari arbeiðspláss kunnu hava til húsa í samantvinnaðum býlingum, har bæði bústaðir og arbeiðspláss kunnu vera – eitt nú við ta nýggju Karlamagnusarbreyt í Hoyvíkshaga og á Boðaneshamri.

Til tess, at ikki øll størri og miðalstór vinnuvirki enda í einum og sama horni av býnum, verður eisini lagt upp til møguleikar hjá vinnuvirkjum vesturi í býnum.

**Stór ónýtt øki**
Býráðið ásannar, at plánurin fyri menning av Vesturbýnum og grannalag hevur ikki verið nóg góður. Býráðið ásannar eisini, at tað almenna hevur fingið fleiri stór øki á hesi leið til taks til almennar stovnar, sum ongan veg ganga.

Hetta arbeiður ímóti okkara býarplánlegging og darvar okkara menning av býarpartinum. Tað ber ikki til, at stórar víddir í Vesturbýnum liggja ónýttar mitt inni millum húsini, tí tá fæst býarparturin ikki til at rigga sum tann heild, hann er ætlaður at vera.

Býráðið eigur tí at umhugsa at seta tí almenna, eins og øllum øðrum, treytir fyri, nær og hvussu skjótt bygt eigur at verða. Verður ikki bygt innan eitt ávíst áramál, mugu vit lata lendið fara til annað, kanska líknandi endamál, og útvega tí almenna lendi aðrastaðni.

**Hesumegin Kirkjubøreyn**
Nú býráðið hevur samtykt endurskoðaðu býarætlanina fyri gomlu Tórshavnar kommunu, verður farið undir eina skipanarætlan fyri tann partin av gomlu Kirkjubøar kommunu, sum liggur argjamegin ella havnarmegin Kirkjubøreyn.

Hendan ætlan fer óivað eisini at fáa árin á heildarætlanina fyri býin.

Har eru stórir spurningar uppi, sum ikki sampakka væl. Skula vit hava flogvøll á Glyvursnesi ella skula vit ikki hava flogvøll á Glyvursnesi?

Stýringarbólkurin, sum er mannaður við fólki úr samgongu, minniluta og embætisverki, fer undir hetta arbeiðið við víðari sjón og miðar eftir at gera tvær alternativar ætlanir – eina við flogvølli og eina uttan flogvøll.

# Rættleiðing

**TORLEIF AUGUSTINUSSEN**
Vestan Hol,
900 Vágur

**Rættleiðing til Dánjal Bjarkhamar og teir, sum skriva Hamrabø (Havrabø) í staðin fyri Prestajørðin.**

Á borgarafundi í VB húsinum sunnudagin 29. januar 2006, eftir at borgarstjórin hevði lagt málið fram, um at byggja eitt ellisheim her í Vági á Prestajørðini, segði Dánjal Bjarkhamar ógvuliga avgjørdur, at nú hevði borgarstjórin funnið uppá at kalla økið, har ellisheim skuldi byggjast, fyri Prestajørðin.

Hann hevði altíð rópt tað fyri Hamrabø, og fór altíð at rópa tað Hamrabø. Vágbingar hava nú aldrin sagt Hamrabø men Havrabø. Nei, mín góði Dánjal. Borgarstjórin visti, hvat hon tosaði um. Tí hon hevur virðing fyri, hvussu hesi ymisku plássini í bygdini eita.

Tað vísti seg soleiðis, at tú ikki visti, hvar ið Prestajørðin var, og enn minni hvar ið Prestatrøðin var. Tað veit hvørt mansbarn her vesturi í bø, at hitt ólukku hol er grivið mitt í Prestatrøðini.

Havrabøur byrjar við matr. nr. 591a og liggur vestan fyri Prestajørðina. Havrabøur hoyrir til Havrahaga og er ognarjørð.

Prestajørðin er landsjørð. Tí er tað nokk so løgið, at Vágs Býráð fer at samráðast við Jarðaráðið um at sleppa at byggja eitt ellisheim í Bavrabø, sum er ogn hjá nøkrum vágbingum.

Takk Kirstin og teir, sum stuðla tær í býráðnum. Vónandi megna tit at fáa bygt eitt ellisheim á Prestajørðini.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónssekreterur:** Inna Törnroos inna@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Tóki Højgaard toki@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Lív Højsted Horsdal horsdal@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 og boða frá, leygardag tó frá kl. 11.00-13.00

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Føroyaprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan $14^{00}$

**Lýsingar**

| **Freistir:** | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.